

# Ein av hvørjum túsund eru føroyingar

Jan Müller

22.03.2014 - 22:20

Oljan.fo

Sambært einari nýggjari frágreiðing arbeiða 24.000 fólk á boripallum í norskum sjóøki. Av teimum eru 12,5 prosent kvinnur.

Í kanningini sæst eisini, at 90 prosent eru norðmenn. Av útlendingunum eru amerikanarar best umboðaðir. Teir eru 400 í tali. 300 danir eru á pallunum, 270 sviar og 220 bretar. Longri niðri á listanum sæst, at finnarnir eru 43 í tali, íslendingar somuleiðis 43, og at 24 føroyingar eru í teirri skrásetingini.

IRIS, sum hevur gjørt frágreiðingina, ger vart við, at tølini umfata ikki tey, sum eru við veitingarskipum, sum liggja hjá pallunum og heldur ikki tey, sum arbeiða uppi á landi í arbeiði, sum hevur tilknýti til pallarnar.